# Mikael Gren
# – Føroyar og altjóða oljuvinna

Jan Müller

Mikael Gren er føddur í Svøríki og kom til Føroya fyri góðum 20 árum síðani. Hann giftist føroyskari kvinnu og tey adopteraðu tvey indisk børn, sum í dag eru 12 og 17 ára gomul. Seinastu tvey árini hava tey øll búð í Mumbai, har Mikael arbeiðir hjá fyritøkuni Transocean, sum rekur fleiri boriskip og pallar.

Hann sær fegin, um olja verður funnin í Føroyum, at hann kann koma heimaftur at arbeiða og lata føroyingar fáa lut í sínum royndum.

Mikael Gren lærdi til maskinmeirstara í Føroyum og bleiv liðugur í 1997. Hann fór til arbeiðis hjá Transocean á heysti sama ár. Í 2006 bleiv hann liðugur sum Master of Science in Management á Robert Gordon University í Aberdeen. Hetta var við fjarlesturi í trý ár.

Frá 1997 og komandi 10 árini arbeiddi hann umborð á boripallum í Bretlandi, Noregi, Suðurafrika, Nigeria, Fílabeinsstrondini, Brasilia, Spania, Hálandi, Egyptalandi og India. Hetta hevur verið eitt sera spennandi arbeiði saman við nógvu ymsum mentanum sigur Mikael. Tað hevur verið áhugavert og læruríkt at verið við til at tilrættaleggja viðlíkahald umborð á boripallum, sum skulu á beding.

Í India hava teir tikið stig til at menna eina nágreiniliga kanning og eftirlit av BOP (Blowout Preventer) útgerð umborð á boriskipum. Hetta fyri at staðfesta, at útgerðin er 100% álítandi, og at teir gera sítt víðlíkahald eftir forskriftunum. Tá eftirlit skal gerast má pallurin liggja stillur í eina tíð og hetta kann vera kostnaðarmikið, men teir taka trygdina framum tað fíggjarlíga, tá tað kemur til útgerð, sum kann vera til vanda fyri lív og umhvørvi, um hon ikki virkar.

Í 2007 fekk Mikael starvið sum "Rig Manager" á einum boriskipi, ið boraði í Egyptalandi. Í 2008 varð hann fluttur til India, har hann gjørdist tekniskur stjóri fyri ankraða pallin Actinia. Í dag er hann tekniskur stjóri umborð á boriskipinum Deepwater Frontier.

Uppgávan sum tekniskur stjóri er at syrgja fyri, at alt tað tekniska umborð riggar, og at viðlíkahald er gjørt eftir fyritreytunum. Hann hevur eisini ábyrgd av, at trygdin hja fólkunum og umhvørvinum er í hásæti. Ein sera týðandi partur av útgerðini umborð er útgerð, sum verður brúkt til at hava eftirlit við brunninum.

Hetta er kostnaðarmikil og serstøk útgerð og sum má rigga til eina og hvørja tíð. Hann hevur so eisini til uppgávu at leggja fíggjarætlanir og fylgja rakstrinum. Ein onnur sera týdningarmikil uppgáva er at leggja langtíðar viðlíkahaldsætlanir, sum ganga 5 ár fram í tíðina.

Í løtuni fyrireika teir at bora ein brunn í Eystur Timor. Har eru trygdarkrøvini sera strong og kunnu sammetast við krøv, sum verða sett palli, ið skal arbeiða á australiskum øki. Har setir stjórnin sera høg krøv til alla útgerð, sum kann ávirka umhvørvið, um okkurt skuldi gingið galið.


*Í dag er Mikael Gren tekniskur stjóri umborð á boriskipinum Deepwater Frontier.*


www.unguforoyar.com

**Málfrøði, bókmentafrøði og heimsbókmentir til teir hægru skúlarnar**

**Ungu Føroyar hava tilboð upp á hesar bøkurnar:**
Klípið · Hugtøk í bókmentafrøði · Salka Valka · Konuni til vildar
Veitsla hjá nornafaðir · Eystur-vestur.




**Lesið meira á www.unguforoyar.com**
t-postur: mail@unguforoyar.com · telefon: +298 510 474
postadressa: Leivsgøta 4, FO-Tórshavn

# Myndakapping
Avmynda lívfrøðiligt margfeldi!






Í samband við at ár 2010 er altjóða ár fyri lívfrøðiligt margfeldi, skipar lívfrøðingafelagið saman við Miðlahúsinum fyri eini myndakapping, har endamálið er at lýsa lívfrøðiliga fjølbroytni í føroysku náttúruni.

Við hesum ynskir Lívfrøðingafelagið at fleiri fáa eyguni upp fyri livandi náttúruni og fara út at taka myndir, sum kunnu lýsa hetta fjølbroytta lívið - ella við øðrum orðum: avmynda lívfrøðiliga margfeldni í Føroyum.

Tá kappingin er liðug fer Miðlahúsið at leggja allar innkomnu myndirnar út á netið.

**Vinningar verða latnir til tríggjar tær bestu myndirnar:**

**1. vinningur:** Eitt Canon EOS 550 fototól (virði: kr. 7.999). Ein Case logic taska (virði: 399 kr.) og eitt 16 GB kort (virði: 699 kr.) fylgir við. Vinningurin verður latin av Føroya Lívfrøðingafelag.

**2. vinningur:** Eitt Canon EOS 450 speglrefleks fototól (virði: kr. 4.999). Vinningurin verður latin av Expert

**3. vinningur:** Ein 1 TB eksternur harðdiskur (virði: kr. 980), ið verður latin av City og kr. 1.500, ið verður latið av Lívfrøðingafelagnum

**Reglur**

Myndin skal vera digital og vera tikin í Føroyum í 2010. Kappingin byrjaði 7. juni og endar 16. august.

Hvør luttakari kann einans senda eina mynd til Miðlahúsið seinast hin 1. august 2010. Myndin skal sendast til **margfeldi@sos.fo**

Lívfrøðingafelagið tekur sær rætt til at brúka innkomnu myndirnar í arbeiði felagsins framyvir, t.d. til heimasíðu, plakatir og faldarar.

Ein dómsnevnd, ið er samansett av trimum pørtum, velur bestu myndirnar. Hvør partur hevur líka nógvar atkvøður. Teir tríggir partarnir eru nevndin í lívfrøðingafelagnum, ein professionellur myndatakari og eitt listafólk.




Sosialurin

Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn